tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2017 |
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Sørensen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen.

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattatøl 2017 | 2 |
| 2 | Kunningarhefti fyri Tvøroyrar kommunu 2017 | 2 |
| 3 | Barnaansing í Tvøroyrar kommunu - tilmæli um ókeypis ansing til 3. barnið | 3 |
| 4 | Stuðul frá kommununi - hvør kann stuðlast? | 4 |
| 5 | Aðalfundur hjá Kommunufelagnum | 5 |
| 6 | Aðalfundur hjá SEV 2017 | 6 |
| 7 | Eykakrav frá Bú- og Heimatænastuni fyri 2016 | 7 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2017 |
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 1. Skattatøl 2017

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri mars mánaða og fyri árið sum heild.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Skattur 2017.xlsx
- Samanbering av skatti 2016-2017.xls

**00.13.06-1-17**

## 2. Kunningarhefti fyri Tvøroyrar kommunu 2017

### Málsfrágreiðing

Bjarni Nygaard, trivnaðarfólk, hevur í samstarvi við umsitingina og rakstrarstøðini gjørt eitt uppskot til kunningarhefti um Tvøroyrar kommunu, sí viðfesta skjal.

Bjarni Nygaard luttekur á fundinum og greiðir nærri frá um kunnningarhefti og endamálið við hesum.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøråvegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2017 |
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Bjarni Nygaard kunnaði um innihaldið í kunningarheftinum, og borgarstjórin upplýsti, at býráðslimir kunnu koma við viðmerkingum til hefti skjótast gjørligt soleiðis at kunningarhefti kann leggjast fyri Býráðið til endaliga støðutakan á býráðsfundinum í mai mánaða.

### Skjøl

- 2017 útgáva

**27.00.00-G00-1-17**

## 3. Barnaansing í Tvøroyrar kommunu - tilmæli um ókeypis ansing til 3. barnið

### Málsfrágreiðing

Sosiala nevnd og fíggjarnevndin við tilmæli um, at lata foreldrum ókeypis ansing fyri 3. barnið, ið tey hava í ansing hjá Tvøroyrar kommunu, sum vil viðføra, at Tvøroyrar kommuna missir kr. 39.600,- í inntøku árliga, sí viðfestu skjøl í málinum.

**Sosiala nevnd, 27. mars 2017, pkt. 6:**

Sosiala nevnd mælir til, at foreldur við 3. barnið í ansing fáa ansingina ókeypis. Málið beint víðari til fíggjarnevndina til støðutakan.

**Fíggjarnevndin, 3. apríl 2017, pkt. 5:**

Fíggjarnevndin samtykti, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd um, at foreldur fáa ókeypis ansing til 3. barnið. Málið beint í Býráðið til endaliga støðutakan.

Bjarni Hammer mælir til, at tað bert skal gjaldast fyri at hava eitt barn í ansing hjá Tvøroyrar kommunu.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 4/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Avgerð

Atkvøðugreiðsla um tvey tilmælir:

Tilmæli frá Bjarna Hammer um, at tað bert skal gjaldast fyri at hava eitt barn í ansing hjá Tvøroyrar kommunu: Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen atkvøða fyri uppskotinum. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Søresnsen og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Uppskoti frá Bjarna Hammer tískil ikki samtykt.

Tilmæli frá sosialu nevnd einmælt samtykt av Býráðnum.

## Skjøl

- Samskifti við Kristinu K. Sørensen um ansingargjøld
- Gjarld barnaansing.xlsx

**00.01.10-G00-3-17**

# 4. Stuðul frá kommununi - hvør kann stuðlast?

## Málsfrágreiðing

Forkvinnan í mentanarnevndini, Anita Vibergsdóttir, ynskir at umrøða, í hvønn mun kommunan kann stuðla einkultum persónum sum eitt nú ganga í skúla.

Tvøroyrar kommuna hevur ikki eina samtykt hesum viðvíkjandi.

Men útgangssttøði sambært kommunalu skipanini er, at tað er ikki loyvt kommununi, at geva fíggjarligan stuðul til einkultar persónar uttan so at hesin stuðul hevur heimild í lóg. Kommunan kann tó stuðla "bleytum virðum" í kommununi, sum er almentgagnligt og sakligt fyri allar borgarar í kommununi til dømis:

- Ítróttar- og mentanartiltøk - íverksetan í mun til frítíðarvirksemi hjá borgarum.
- Kommunan hevur ikki loyvi til vinnuligt virksemi, tó til egna nýtslu.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2017 |
| Fundardagur | 6. apríl 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Tað hevur verið siðvenja í Tvøroyrar kommuna, eftir umsókn, at stuðla skúlanæmingum av Tvøroyri fíggjarliga, sum fara námsferðir og útferðir í skúlahøpi. Tí hevur Tvøroyrar kommuna eisini á fíggjarætlanini í ár sett av kr. 55.000,- m.a. til ein tílíkan stuðul.

**Mentanarnevndin, 27. mars 2017, pkt. 10:**

Mentanarnevndin umrøddi spurningin og beinir málið til víðari viðgerð í Býráðnum. Kommunustjórin kannar, um møguligar samtyktir eru um evni.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at varðveita verandi siðvenju um at stuðla skúla-ungdómum í kommununi, sum eftir umsókn søkja um stuðul til uttanlandaferð, námsferð ella líknandi. Býráðið ynskti í hesum sambandi, at skúla-ungdómur, sum verður stuðlaður, venda aftur til kommununa við einari frágreiðing við afturkomu.

**00.24.00-A00-1-17**

## 5. Aðalfundur hjá Kommunufelagnum

### Málsfrágreiðing

Kommunufelagið hevur aðalfund tann 21. apríl 2017 og eftirfylgjandi er veitsla á Hotel Føroyum fyri býráðslimum og kommunustjórum/skrivarum við maka, sí viðfestu kunning frá Kommunufelagnum.

Kommunurnar gjalda hvør í sínum lagi fyri útreiðslurnar til veitsluna. Fyri Tvøroyrar kommunu vil henda upphædd verða áleið kr. 22.000,- um øll luttaka.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fíggja veitsluna fyri býráðslimum við makum, sum verður hildin aftaná aðalfundin í Kommunufelagnum tann 21. apríl í ár.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2017 |
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Skjøl

- Kunning til býráðslimir um aðalfundin hjá Kommunufelagnum
- Innbjóðing til aðalfund 2017
- Praktiskar upplýsingar.docx
- Kunningar-tilfar í sambandi við aðalfundin

**13.01.00-1-17**

## 6. Aðalfundur hjá SEV 2017

### Málsfrágreiðing

Innbjóðing til aðalfund í SEV, sum verður hildin á Hotel Føroyum fríggjadagin tann 21. apríl 2017 kl. 09:30. Alvi Mortensen, býráðslimur, umboðar Tvøroyrar kommunu í SEV.

### Avgerð

Alvi Mortensen fær ikki møtt á aðalfundi hjá SEV, men borgarstjórin luttekur og hevur atkvøðurætt. Eisini luttaka Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen á fundinum.

### Skjøl

- Kunning um aðalfundin send býráðslimum
- Fundarboð 2017.04.21.pdf

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøråvegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 4/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.10-A00-4-17**

## 7. Eykakrav frá Bú- og Heimatænastuni fyri 2016

### Málsfrágreiðing

Bú- og Heimatænastan í Suðuroynni er komið við eykakravið til Tvøroyrar kommunu og aðrar kommunur í Suðuroynni fyri 2016, sí viðfestu skjøl.

Tvøroyrar kommuna setti 16.390 mió. kr. av í fíggjarætlanini fyri 2016 til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroynni. Í endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri Bú- og Heimatænastuna fyri 2016 skuldi hesin partur hjá Tvøroyrar kommunu verið 16.887,232, tvs. ein meirkostnaður hjá Tvøroyrar kommunu á 497,232 tús. kr. Hallið hjá Bú- og Heimatænastuni í 2016 merkir fyri Tvøroyrar kommunu ein eykakostnað á 232.491 tús. kr., tvs. at Tvøroyrar kommuna hevur eitt eykakrav frá Bú- og Heimatænastuni á 729.723 tús. kr., sum Tvøroyrar Býráð á fundinum í kvøld skal taka støðu til, um Býráðið ynskir at gjalda hetta eykakrav til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroynni.

Nevnda eykakrav á 729.723 tús. kr. kann fíggjast av kontu fyri afturbering (135.926 tús. kr.) + 593.797, sum verður fíggja av gjaldførinum. Hetta eykakrav frá Bú- og Heimatænastuni kemur at kosta Tvøroyrar kommunu íalt 326.797 tús. kr. fyri 2016. Restin - upp til 729.723 tús. kr. - verður goldin av afturberingini.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt eina eykajáttan á 729.723 tús. kr. í sambandi við eykakravið frá Bú- og Heimatænastuni fyri 2016.

### Skjøl

- Samskifti millum borgarstjóra og fíggjarleiðara í.s.v. eykakrav
- Yvirlit yvir eykakrav frá Bú- og Heimatænastuni fyri 2016
- Teldubræv frá fíggjarleiðaranum

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2017 |
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 17:55**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Kambskarð Sørensen

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2017 |
| Fundardagur | 6. april 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan